Farloyvið hoyrir fyrst og fremst mammuni til

– Hava foreldur hug at býta farloyvið ímillum sín, kunnu tey gera tað síðstu 10 vikurnar. Atlitið er fyrst og fremst tikið til mammuna, í aðru atløgu til pápan, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður

BARSILSSKIPAN
Turið Kjølbro

Stendur tað til landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum, Bjarna Djurholm, fer nýggi Barnsburðargrunnurin at virka frá 1. apríl í ár. Lógaruppskot um grunnin varð lagt fyri tingið beint fyri jól og tí skuldi verið góðar stundir at avgreitt málið til ta tíð. Landsstýrismaðurin er væl nøgdur við uppskotið og metir tað vera eina góða byrjan uppá eina skipan, sum kemur stórum parti av arbeiðsmarknaðinum til gagns.

– Uppskotið er ikki skundað ígjøgnum, sum so nógv onnur verða tað. Møguleiki er altíð seinni at gera broytingar og tillagingar, um vilji er til tað í tinginum. Vit hava lagt okkum eftir at gera eina bíliga skipan, sum kortini er so munagóð og viðfevnd, sigur hann.

Lógaruppskotið sýnist í førum at vera ógreiður. Millum annað kemur tað ikki nóg týðiliga til sjóndar í tekstinum, at tað er lønargrundarlagið hjá tí,ið fer í farloyvi, sum skal liggja til grund fyri útgjaldið í farloyvistíðini. Teksturin kann nevniliga tulkast soleiðis, at tað er lønin hjá mammuni, ið avger útgjaldið, eisini tá ið pápin fer í farloyvi. Landsstýrismaðurin vissar kortini fyri, at tað er lønin hjá tí, ið fer í farloyvi, sum liggur til grund.

Pápin betri rætt

Eitt er, at stórur partur av løntakarunum fáa betri umstøður í farloyvistíðini. Annað er, at páparnir í størri mun enn áður kunnu vera heima hjá barninum fyrsta hálva árið við fullari løn.

– Viðurskiftini hjá pápanum eru munandi batnað í mun til tær reglur, sum eru galdandi í dag, eisini fyri tey, sum hava havt eina skipan. Tað er ómøguligt at siga framman undan, um fleiri pápar fara í farloyvi, men nú hava teir so møgu leikan, sigur Bjarni Djurholm.

Sambært lógaruppskotinum hevur mamman rætt til óskorið farloyvi fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð. Næstu 10 vikurnar kunnu foreldrini býta sínámillum. Hví tað ikki er upp til hvørt einstakt par sjálvi at gera av, nær mamman og nær pápin fara í farloyvi, sigur Bjarni Djurholm.

– Vit halda, at farloyvisrætturin fyrst og fremst hoyrir mammuni til, tí hon ber barnið og føðir tað. Hava foreldrini hug til at býta tíðina millum sín, kunnu tey gera tað síðstu 10 vikurnar av farloyvinum. Atlitið er fyrst og fremst tikið til mammuna, í aðru atløgu til pápan. Hetta er eitt val, vit hava gjørt, sigur Bjarna Djurholm.

Nýggja barsilsskipanin tryggjar børnum samveru við bæði mammu og pápa. Henda myndin, ið er tilvildarliga vald, varð tikin í Vøggustovuni á Argjum í vikuni

Mynd: Jens Kr. Vang

Lítil málsviðgerð

Í viðmerkingunum frá ymsum fakfeløgum til lógaruppskotið um barsilsskipan sæst, at tey ikki meta tað er rætt, at Arbeiðsloysistryggingin skal umsita nýggja barnsburðargrunnin. Hinvegin er tann avgerðin tikin í Vinnumálastýrinum, og Arbeiðsloysistryggingin fer frá 1. apríl at umsita grunnin.

– ALS hoyrir arbeiðsmarknaðinum til og tað er natúrligt, at hann umsitur henda grunnin. Stovnurin hevur gott innlit í arbeiðsmarknaðarviðurskifti yvirhøvur, hann er væl førur fyri at umsita skipanina, og nýggi grunnurin krevur lítla og onga málsviðgerð, sigur Bjarni Djurholm.

Mett verður, at tað kostar 1,8 mió. kr. um árið at umsita nýggju barsilsskipanina. At seta skipanina í verk fer at kosta 2,8 mió. kr., verður mett.

Løntakarar javnsettir

Samgongan hevur í samgonguskjalinum ásett, at barnsburðargrunnurin skal setast á stovn í hesum valskeiðnum.

– Eitt tað fyrsta eg gjørdi, tá ið eg kom til arbeiðis sum landsstýrismaður, var at fáa ferð á arbeiðið við barnsburðargrunninum. Tað er sera týdningarmikið, at allir løntakarar á arbeiðsmarknaðinum eru javnsettir, tá ið tað ræður um at eiga børn og vera heima hjá teimum. Ein og hvør skipan uttan mun til, hvussu hon verður sett saman, skal gjaldast. Eg skilji ikki, hví fakfeløg eru ímóti skipanini, sum avgjørt má metast sum eitt stórt framstig, serstakliga fyri tímaløntar løntakarar, sigur Bjarni Djurholm.

Allir løntakarar skulu um lønina gjalda í grunnin. Tey flestu okkara fara ikki at merkja stórvegis til gjaldið, tí samstundis sum nýggja gjaldið fer av lønini, verður inngjaldið til ALS lækkað samsvarandi. Sum dømi kunnu vit siga, at løntakari, sum sær 150.000 kr. í løn um árið, rindar 31 kr. um mánaðin í grunnin.

Barnsburðargrunnurin stórt framstig

– Nýggja barsilsskipanin liggur tætt at teimum hugsanum, Javnstøðunevndin hevur gjørt sær. Ymist kundi kortini verið øðrvísi. Eitt nú er spurningurin, hví foreldur ikki í størri mun sjálvi kunnu gera av, nær og hvussu leingi tey eru í farloyvi innan fyri karmin, tey fáa útgjald, sigur Turið Debes Hentze, forkvinna í Javnstøðunevndini

BARSILSSKIPAN
Turið Kjølbro

– Grannalond okkara hava góðar royndir av serliga pápafarloyvinum, sigur Turið D. Hentze, forkvinna í Javnstøðunevndini

Eingin ivi er um, at barnsburðargrunnurin, sum eftir øllum at døma kemur um stutta tíð, verður ein kollvelting fyri føroyska arbeiðsmarknaðin, ikki minst kvinnurnar. Í desember legði landsstýrismaðurin í vinnumálum lógaruppskot um nýggja barsilsskipan fyri tingið. Uppskotið liggur í løtuni í Trivnaðarnevndini og sum skilst hevur tað ikki verið fyri har enn. Fakfeløg og onnur hava gjørt viðmerkingar til lógaruppskotið, og hóast serliga fakfeløgini leika í og hava ógvuliga góðan hug at markera seg hesum viðvíkjandi, taka tey flestu sum heild undir við uppskotinum.

– Ymiskt í lógaruppskotinum er ógreitt. Millum annað sær út til, at tað skal vera lønin hjá mammuni, sum verður løgd til grund fyri útgjaldið, hóast pápin fer í farloyvi. Tað má ikki henda, tí tað fer avgjørt at forða fyri, at pápar fara í farloyvi. Og eg dugi ikki at síggja, hví lønin hjá tí,ið fer í farloyvi ikki skal liggja til grund fyri útgjaldinum, tí konur og menn rinda í mun til sína løn í grunnin, sigur Turið D. Hentze, forkvinna í Javnstøðunevndini.

Mamman farloyvið

Uppskotið hjá landsstýrinum liggur tætt at teimum tonkum, Javnstøðunevndin hevur gjørt sær um grunnin. Javnstøðunevndin hevur arbeitt við málinum í fleiri ár og hevur eisini sent landsstýrinum eitt útgreinað uppskot. Treyðugt so er ymisk í lógaruppskotinum, sum kundi verið øðrvísi, heldur Turið D. Henze.

– Sambært uppskotinum er tað mamman, sum eigur farloyvið og sum síðani letur nakrar vikur frá sær. Skuldi ein pápi ynskt at tikið ein størri part av farloyvinum, ber hetta ikki til sambært uppskotinum. Spurningurin er, hví tað í uppskotinum so klárt skal greinast út, nær mamman og nær pápin fara í farloyvi. Tað rættasta hevði verið, at tað er upp til foreldrini at gera av, nær og hvussu leingi tey eru í farloyvi hvør sær innan fyri karmin, tey fáa útgjald. Serliga, tá ið hetta í grundini er teoretiskt, tí í allar flestu førum velur kvinnan at vera heima hjá barninum.

Tá tað er sagt, metir hon, at tað hevur alstóran týdning, at serligt pápafarloyvi upp á tvær vikur verður ásett í lógini.

– Tað eggjar og stuðlar pápanum at taka farloyvi í endanum av farloyvinum og gevur teimum samstundis høvi til einsamallar at taka og vísa ábyrgd í heimliga arbeiðinum. Grannalond okkara, serliga Danmark og Svoríki, hava góðar royndir av hesum, sigur Turið D. Hentze.

Endurgjald skal veitast arbeiðsgevaranum, tá ið foreldur fara í farloyvi, men tað er sambært lógaruppskotinum upp til arbeiðsgevaran, um hann setur avloysara.

– Sæð frá sjónarmiðum hjá arbeiðsgevara og arbeiðstakara er tað rættasta at seta avloysara, tí hjá tí, sum fer í farloyvi er gott at vita, at burturveranin ikki tyngir starvsfelagarnar, júst tí avloysari er settur, sigur Turið D. Hentze.

Burturvið at fakfeløgini halda uppá lønarmiss

– Virði er ongantíð sett á barnsburðargrunnin, sum partur av lønarhækking, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður

BARSILSSKIPAN
Turið Kjølbro

– Tá ið ALS-gjaldið lækkar samstundis og samsvarandi, fer eingin at merkja nakra beinleiðis meirútreiðslu, tá ið nýggja barsilsskipanin fer at virka, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður

Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum, Bjarni Djurholm, er ikki samdur við Starvsmannafelagnum í, at limir felagsins skulu gjalda eina ferð afturat til barsilsgrunn, nú nýggj skipan kemur fyri allar løntakarar á arbeiðsmarknaðinum. Starvsmannafelagið vil ikki góðtaka, at lóggáva verður gjørd, sum áleggur limum teirra at gjalda til eina skipan, sum teir longu hava goldið til. Felagið sigur, at tá ið barnsburðargrunnurin fer at virka, skulu stovnar og starvsfólk hjá tí almenna rinda 0,8 %, sum tey longu gera, umframt 0,5 % til nýggja grunnin.

– Tað er púra burturvið, at fakfeløgini halda uppá, at tey missa 1,3%. Hetta talið koma tey til við at leggja saman 0,8,ið er lønarkarmurin hjá almennu stovnunum við 0,25 %,ið er inngjaldið hjá løntakaranum til nýggju barsilsskipanina og 0,25% frá almennu inngjaldingini til skipanina. Hetta er tað sama sum at leggja appelsinur, sitrónir og bananir saman. Tað gevur onga meining og er eisini skeivt, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

– Gjaldið frá arbeiðsmarknaðinum, tvær ferðir 25%, er ikki ein skattur, hóast gjaldið kann tulkast so. Her er talan um gjald, sum er markað til ávíst endamál. Beinleiðis skattur verður goldin í landskassan og verður síðani lutaður útaftur á einstøku greinunum á fíggjarlógini, soleiðis sum politiski viljin er. Tað vil siga, at skattgjaldarin, mótsatt gjaldinum til barsilsløn, ikki beinleiðis veit, hvat skatturin verður brúktur til.

Virði ikki sett

Í uppskotinum til fíggjarlógfyri 2001 verður í viðmerkingunum til § 3.18.3.01. sagt: Í semjuni, sum varð gjørd við tjúgu fakfeløg 9. apríl 1995, er avtalað, at frá 1. januar 1996 verður felags barnsburðargrunn settur á stovn. Hetta varð gjørt soleiðis, at 0,8% av lønarpartinum hjá øllum almennum stovnum skuldi setast á eina felags konto at gjalda starvsfólki, sum kemur í staðin fyri tær starvskvinnur, sum eru í barnsburðarfarloyvi. Grunnurin skuldi setast á stovn fyri at forða fyri, at summir stovnar verða raktir serliga hart, tá ið starvskvinna fer í barnsburðarfarloyvi.

– Virði er ongantíð sett á barnsburðargrunnin, sum partur av lønarhækking. Hann bar í sær, at útreiðslurnar í sambandi við at seta avloysara fyri konu í barnsburði vóru útjavnaðar. Lønarkarmurin hjá einstøku stovnunum varð lækkaður 0,8%, tað vil siga, at hetta hevur einki við lønirnar hjá tí einstaka at gera. Verandi skipanin ber í sær, at tað loysir seg ikki hjá stovninum at spara avloysaran burtur, stovnurin skal framvegis rinda konuni í barnsburði fulla løn, og fær bara endurgoldið úr barnsburðargrunninum, um hann setur avloysara. Grunnurin ber ikki í sær meiri ella minni løn hjá einstaka løntakaranum, men tryggjar, at tað ikki er nøkur fíggjarlig byrða at hava barnakonur í starvi. Hetta tryggjar eisini, at tey sum eru til arbeiðis, skulu ikki renna skjótari, tá avloysari verður settur fyri barnakonuna.

– Uppskotna skipanin broytur ikki hesi viðurskifti. Tað einasta tey almennu skulu gjalda afturat, er tað sama sum øll hini, nevniliga 0,25%. Hetta kann roknast sum ein meirútreiðsla, tá tey hava eina skipan frammanundan, men hana hava so øll hini higartil eisini verið við til at gjalda um skattin. Tá ALS-gjaldið lækkar samstundis og samsvarandi, fer eingin at merkja nakra beinleiðis meirútreiðslu. Tað má roknast at vera rímiliga væl sloppið fyri eina skipan, sum hóast alt er so viðfevnd og samanlagt kostar 45 mio árliga, sigur Bjarni Djurholm.

Sleppa ikki vunnum rættindum

Starvsmannafelagið góðtekur ikki mannagongdina, sum Vinnumálastýrið hevur brúkt í sambandi við lógaruppskotið um barnsburðargrunn. Felagið vónar, at spurningurin um tey 0,8 %, sum limir felagsins hava goldið í barnsburðargrunn síðani 1996 verður avgreiddur, áðrenn lógaruppskotið um barsilsskipan kemur til viðgerðar

BARSILSSKIPAN
Turið Kjølbro

Tað er komið dátt við hjá Starvsmannafelagnum, at viðmerkingar felagsins ikki eru bornar tingfólki til kunningar, eins og viðmerkingar og ummæli frá øðrum fakfeløgum. Myndin, sum er tilvildarliga vald, er tikin í Vøggustovuni á Argjum í vikuni

Mynd: Jens Kristian Vang

Tá ið lógaruppskotið um nýggja barsilsskipan varð lagt fyri tingið, fingu tingfólk og onnur høvi at lesa viðmerkingar frá fakfeløgum og øðrum til uppskotið. Viðmerkingar Stravsmannafelagins vóru ikki tiknar við, og tað átalar felagið harðliga. Eisini er tað komið dátt við hjá Starvsmannafelagnum, at landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum ikki avgreiddi spurningum um prosent-gjaldið, sum limirnir hjá Starvsmannafelagnum góðtóku at rinda í barnsburðargrunnin undir sáttmálasamráðingunum í 1995, áðrenn lógaruppskotið kom fyri tingið.

Málið snýr seg um 0,8 prosent,ið fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum góðtóku at rinda í barnsburðargrunnin. Starvsmannafelagið sigur í viðmerking, at hetta var ein partur av lønarhækkingini hjá limunum. Eisini Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya heldur fast við, at 0,8 prosentini eru partur av lønarhækkingini í 1995.

– Tað er púrasta óskiljandi, at nakar kann finna upp á at siga, at hetta ikki var partur av lønarhækking okkara. Høvdu vit ikki fingið semju um at flyta 0,8 % í barnsburðargrunnin, høvdu endaligu lønarkrøv okkara verið 0,8 % hægri , sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum í viðmerkingunum,ið eru sendar løgtinginum.

Rættartrygdin burtur

Víðari í viðmerkingunum sigur Starvsmannafelagið, at tað er einki eindømi, at lønarhækking í sambandi við undirskriving av nýggjum sáttmála, verður latin á ymsan hátt, sum t.d. eftirløn, frídagar, barnsburðarfarloyvi umframt vanlig lønarhækking, og neyvan fer nakar at gera galdandi, at limirnir í fakfeløgunum bert hava løgfrøðiligan rætt til partar av teimum sømdum, sum nýggur sáttmáli hevur givið hesum limum. Hugtakið ”lønarhækking” skal tí ikki bert skiljast sum tann hækking í mánaðarlønini, sum tann einstaki løntakarin fær, tí vanligt er at fakfeløgini góðtaka at slaka í vanligu lønarkrøvunum soleiðis, at limirnir í staðin fáa ymiskar aðrar batar í starvsrættindum sínum, t.d. í sambandi við barnsburðarfarloyvi sum sáttmálasamráðingarnar í 1995 eru dømi um.

Lønardeildin í Fíggjarmálastýrinum gevur Starvsmannafelagnum rætt í, at tey 0,8 prosentini veruliga eru at meta sum lønarhækking. Um verandi barnsburðargrunn sigur lønardeildin, at felagskontoin verður avtikin, og samstundis skulu starvsfólk og stovnar rinda eitt gjald til nýggja grunnin, uttan at felagskontoin verður deild út aftur. Hetta viðførir, at stovnar og starvsfólk hjá tí almenna koma at rinda 0,8 %, sum tey longu gera, umframt 0,5 % til nýggja grunnin, tað vil siga 1,3 %.

– Løgfrøðiliga kann tí eingin ivi vera um, at limir okkara eiga rætt til nevndu 0,8 %, og vit vænta tí, at Løgtingið og løgtingslimir viðurkenna henda rættin, og ikki vísa somu vanvirðing fyri alment løntu starvsfólkinum, sum Vinnumálastýrið tykist at gera, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

– Tað er átaluvert, at Vinnumálastýrið tekur sær rættindi at tulka sáttmála, sum Fíggjarmálastýrið hevur gjørt við fakfeløgini hjá teimum alment løntu, tí hetta er at leggja seg út í viðurskifti, sum liggja uttan fyri máls- og heimildarøkið hjá Vinnumálastýrinum. Vit góðtaka ikki, at lóggáva verður gjørd, sum beinleiðis fer at áleggja limum okkara at gjalda til eina skipan, sum teir longu hava goldið, tí so kann hetta ikki skiljast á annan hátt enn at sjálvt Føroya Løgting tekur alla rættartrygd frá alment løntu starvsfólkunum. Fyri rættartrygdina hevur tað avgerandi týdning, at tilvildarligur landsstýrismaður ikki við lógaruppskoti skal kunna áleggja borgarum at gjalda til eina skipan, sum hesir longu hava goldið.

ALS óheppið

Starvsmannafelagið endurtekur í viðmerkingunum til løgtingið, at tað er sera óheppið at leggja leiðsluna fyri einum barnsburðargrunni til ALS at umsita.

– Skal ALS umsita barnsburðargrunnin, fara feløgini undir øllum umstøðum at krevja, at útreiðslurnar av hesari umsiting ikki verða álagdar ALS, tí hetta meta vit vera brot á ALS-lógina og eisini á tær fyritreytir, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum høvdu í sambandi við stovnsetaninna av ALS-skipanini, sigur Starvsmannafelagið.